| | Býráðsfundur<br>04. juli 2018 | Blað nr.: 646<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** 04. juli 2018 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr: 170/18 – 178/18**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Sjúrður Olsen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Sigurð Ó. Vang

**LUTTÓKU IKKI:**
Bogi Andreasen

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 170/18 | 18/02629-1 | Bogi Andreasen: farloyvi frá býráðnum | 648 |
| 171/18 | 15/03776-1 | Útbygging av høllini í skúlanum á Argjahamri | 649 |
| 172/18 | 18/00057-2 | Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri | 656 |
| 173/18 | 18/00482-1 | Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - plásstørvur | 660 |
| 174/18 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 664 |
| 175/18 | 18/01897-1 | Arbeiðsbólkur at endurskoða reglurnar um samsýning av kommunustýrislimum | 679 |
| 176/18 | 18/01334-2 | Gera ymisk átøk undir Kongavarða, Argir | 682 |
| 177/18 | 18/00747-3 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina í sambandi við matr. nr. 1292f og 1292a, Tórshavn | 684 |
| 178/18 | 18/02404-2 | Matr. nr. 135gx, Hoyvík. Umsókn um loyvi til víðarisølu av grundstykkið við ástandandi bygningi í gerð. | 688 |

## *170/18 Bogi Andreasen: farloyvi frá býráðnum*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 170/18 | 18/02629-1 |

**Málslýsing:**
Bogi Andreasen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Sjúrður Olsen, eru loknar.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Tikið til eftirtektar.

# 171/18 Útbygging av høllini í skúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 203/15 | 15/03776-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 216/15 | 15/03776-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 276/15 | 15/03776-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 25.11.2015 | 238/15 | 15/03776-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 302/15 | 15/03776-1 |
| 6 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 238/15 | 15/03776-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.12.2015 | 333/15 | 15/03776-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.12.2015 | 255/15 | 15/03776-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 8/16 | 15/03776-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 13/16 | 15/03776-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 50/16 | 15/03776-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 53/16 | 15/03776-1 |
| 13 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 39/16 | 15/03776-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 25.02.2016 | 83/16 | 15/03776-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 208/18 | 15/03776-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 202/18 | 15/03776-1 |
| 17 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 143/18 | 15/03776-1 |
| 18 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 171/18 | 15/03776-1 |

**Málslýsing:**
***Søga***
Skúlin á Argjahamri www.argjaskuli.fo varð liðugt bygdur á sumri 2011 og varð tikin í brúk í august 2011. Fimleikarhøllin í skúlanum er 22 m. x 22 m. og hevur umleið 196 m2 í goymslurúmum. P/F MAP Arkitektar var ráðgevarafelag og P/F Articon bygdi skúlan í partalagsavtalu.

Ítróttavirksemið er umfatandi í Tórshavnar kommunu og hevur verið í støðugum vøkstri farnu árini. Torført er at nøkta eftirspurningin og tørvin hjá ítróttafeløgum. Nýtslustigið av høllini er at kalla fult hvønn dag eftir skúlatíð og í vikuskiftunum.

***Uppskot til loysn***
Upprunaliga var ætlan, at fimleikahallirnar skuldu hava stødd sum ítróttarhøll. Hetta ber framvegis til at fremja við eini uppíbygging á tilsamans 685 m2., so møguleiki verður fyri hondbóltskappingarvølli á 20 m x 40 m, umframt frástøðugeira til vegg, 2,8 metrar frástøðu til vegg vestureftir (verandi bygningslutir í vestaru framsíðu, kunna í stóran mun endurnýtast). og 2,7 metur frástøðu eystureftir. 1,5 m. frástøða suðureftir og 1,2 frástøða móti sitiplássum norðureftir.

Við at skera í verandi vegg norður eftir, og flyta hann 1,9 metrar inn í verandi goymslur, ber til at fáa pláss fyri 3 røðum av sitiplássum. Við 0,5 m til hvørt sitipláss, verða 210 sitipláss í uppskotinum.

Pláss er gjørt til at útvega tvey skiftingarrúm aftrat, og tvær goymslur eru varðveittar til verandi goymslu.

Roknað verður við, at verandi el- og HVS-skipanir kunnu trekkjast víðari fram, og stórvegis

eykaútreiðslur verða ikki til samlaðu dimensioneringina av hesum anleggum.

***Kostnaðarmeting***
Fyribils verður mett at talan kann verða um eina bygging fyri umleið 15 mio.kr., umframt ráðgeving, ókent v.m. á umleið 1 mio.kr. Onkrar óvissur eru, sum mugu kannast nærri í fyrireikingunum. Mett byggitíð, íroknað projektering er 16 mánaðir, og mett verður, at projektering kann byrja í januar 2016.

***Nyttuvirði***
Við útbyggingini fæst ein hondbóltsvøllur afturat, sum kann brúkast til hondbólt, flogbólt o.a. og ÍA, sum er felag á Argjum, kann í høvuðsheitum fara úr Høllini á Hálsi og so verða sjey tímar tøkir har. Um t.d. Fleyr fer úr Gundadalshøllini verða 11 tímar tøkir har. Hesar tilsamans 18 tímarnar kundu Kyndil, H-71 og Neistin so fingið aftrat.

Møguligt býti millum tey feløg, sum fara at brúka høllina í Skúlanum á Argjahamri kundi verið, at ÍA fær (í mun til støddarbýti millum hondbóltsfeløgini) 15 tímar og Fleyr fær 20 tímar.

Umframt venjing kunnu kappingardystir eisini vera á Argjahamri, og trýstið verður tað minni á Høllina á Hálsi og á Hoyvíkshøllina. Verkætlanin er tískil áhugaverd, tí talan verður um lutfalsliga høga nyttu fyri ein sámiligan kostnað.

***Onnur viðurskifti í byggitíðini***
Byggingin fer at órógva virksemið í skúlanum nakað, bæði virksemið í høllini, í skúlanum sum heild og tað kvøldskúlavirksemi, sum er í skúlanum, serliga í sambandi við sprongiarbeiðið, og tá veggurin vestureftir verður tikin niður. Hetta krevur neyva ráðlegging saman við skúlanum og Ítróttaranleggum, ið samskipar tað virksemið, sum er í høllini eftir skúlatíð. Tí má byggingin í ávísan mun lagast til skúlan, virksemið hjá Ítróttaranleggum, feløgini, sum brúka høllina og til Kvøldskúlan.

***Fyrireikingar***
Til tess at realisera hesa ætlan, er uppskot at fara undir samskifti við P/F Articon og P/F MAP arkitektar um verkætlanina. Hetta grundað á, at talan er um feløg, ið vóru við í upprunaligu verkætlanini, og at fleiri fyrimunir eru í at halda fram við somu feløgum. Úrslitið av hesum verður so grundarlag fyri endaligari støðutakan um bygging.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at fara undir samskifti við omanfyri nevndu feløg um útbygging av høllini í Skúlanum á Argjahamri at leggja fyri nevndina aftur í november 2015.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við P/F Articon og P/F MAP Arkitektar um málið og fyriliggur nú møguleiki fyri at gera avtalu, har feløgini saman við kommununi halda fram í upprunaliga partalagnum um Skúlan á Argjahamri uppá hesa útbyggingina, sum kann verða framd fyri 15,5 mio.kr. umframt kommununar MVG á 6,25%. Verkætlanin kann byrja í desember 2015 og verða avhendað til skúlaársbyrjan 18. august 2016.

Í máli nr. 14/04763 sæst nærri frágreiðing um, hvussu henda útbygging gevur fleiri hallartímar til feløgini í høvuðsstaðnum. Talva við tímum í høllunum er viðfest.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at gera endaliga avtalu um partalag uppá útbyggingina fyri í mesta lagi kr. 15,5 mió umframt mvg, og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Útsett til komandi fund.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Útsett.

**Mentamálanevndin 25. november 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur undir við av víðka høllina í skúlanum á Argjahamri, men mælir til at byggiarbeiðið verður boðið út millum byggifeløg.

Ein annar minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur undir við at víðka høllina í skúlanum á Argjahamri, men mælir til at arbeiðið verður boðið út.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at heita á umsitingina um at koma við nýggjum tilmæli til útbjóðingarhátt, sum verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina á eyka fundi.

**Ískoyti:**
Sum uppfylging uppá viðgerðina í fíggjarnevndini 2. desember 2015 verður mælt mentamálanevndini til at taka støðu til annan av tveimum útbjóðsháttum:

a). Undirhondsboð
b). Innboðin øvugt licitatión

Í báðum málum verður ásett eitt evsta mark fyri HVÚ (hondverkaraútreiðslur) á 12,5 mió.kr. Vinnandi tilboðið er tað, sum kemur tættast at tí ella lægri. Tilboðið skal skipast sum ein heildararbeiðstøka, sum fer yvir í eitt partalag saman við Tórshavnar kommunu og Sp/f MAP ark. sum ráðgeva.

**Útgreining av báðum útboðsháttunum:**
*Viðv. Undirhondsboði*
Mælt verður til at annar tilboðsgevarin verður P/F Articon og víst verður á ein annan. Ætlanin er síðani at fara á ástaðarfund við hesar við fyriliggjandi tilfari uppá verandi skúla og tilhoyrandi frágreiðing um ætlanina, og harfrá biðja um tilboð við støði í áður ásettari upphædd og fyribils atkomuvegi vestanfyri, so byggingin tarnar og órógvar skúlan minst møguligt. Vent verður síðani aftur til mentamálanevndina og fíggjarnevndina við úrslitinum av

tilgongdini.

*Viðv. Innboðin øvugt licitatión*
Ætlandi kann farast undir projektering primo januar og 3 mánaðir fram. Ráðgevaratoymið við Sp/f MAP ark. sum høvuðsráðgeva fær, treytað av hóskandi semju, uppgávuna vegna teirra leiklut og kunnleika til áður gjørda projektering av Skúlanum á Argjahamri. Síðani er ætlanin at hava innbodna licitatión í apríl 2016, og farast kann undir byggingina áðrenn summarfrítíðina 2016. Innbjóðing verður send til 3-5 av teimum størri byggifeløgunum í Føroyum. Um hesin hátturin verður valdur, fer umsitingin í samráðingar við ráðgevaratoymið um projektering og vendir aftur til mentamálanevndina og fíggjarnevndina primo januar 2016.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu millum útboðsháttin undirhondsboð ella innboðin øvugt licitatión, sum lýst omanfyri og at heimila umsitingini at fremja neyðugar atgerðir í hesum sambandi og venda aftur til nevndina við einum úrsliti primo januar 2016.

**Mentamálanevndin 07. december 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Sigrun Mohr, mælir til at bjóða arbeiði út sum eitt undirhondsboð sum lýst omanfyri.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 09. december 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við mentamálanevndini og mælir býráðnum til at bjóða arbeiðið út í innbodna øvugta licitatión.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu.
Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus og Annfinn Brekkstein.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu.
Jógvan Arge, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur biðið Sp/f MAP arkitektar um at geva tilmæli um hvørji feløg skulu fáa møguleika at geva undirhondsboð uppá at útbyggja høllina í Skúlanum á Argjahamri. Sí hjálagt tilmæli og tíðarætlan.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við tilmælinum hjá MAP at heita á TG Verk og Articon um at geva undirhondsboð uppá at útbyggja høllina í Skúlanum á Argjahamri.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Ein meiriluti Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
**Ískoyti:**
Tilboð uppá at útbyggja høllina í skúlanum á Argjahamri eru innkomin. Í útbjóðingartilfarinum varð somuleiðis biðið um alternativt tilboð at víðka áskoðaraplássini í verandi parti av høllini.

Tilboðini eru áljóðandi:

**Sp/f TG Verk:**

| | | |
|---|---|---|
| Tilboð | kr. | 16.983.149 uttan mvg. |
| Alternativt tilboð | kr. | 17.757.943 uttan mvg. |

**P/F Articon:**

| | | |
|---|---|---|
| Tilboð | kr. | 18.423.318 uttan mvg. |
| Alternativt tilboð | kr. | 19.083.662 uttan mvg. |

Umsitingin hevur sett í verk sparingar av tilboð hjá Sp/f TG Verk, sum hevði lægstu tilboðini. Alternativa tilboðið snýr seg í høvuðsheitum um at fáa áskoðarapláss framvið allari høllini, sambært viðheftu tekningum t.e. umleið 200 áskoðarapláss.

Ætlanin er at arbeiðið verður framt í partalagi millum Tórshavnar kommunu, Sp/f TG Verk og Sp/f MAP arkitektar.

Samlaði kostnaðurin á verkætlanina er áljóðandi:

| | | |
|---|---|---|
| Alt.tilboð hjá TG Verk við sparingum | kr. | 15.211.778 |
| Prosjektering, eftirlit, MAP ark. | kr. | 1.445.119 |
| Prosjektumsiting og byggileiðsla | kr. | 145.763 |
| Arbeiðstøkurygging o.a. | kr. | 45.000 |
| Ókent | kr. | 608.471 |
| Mvg (6,25%) | kr. | 1.043.869 |
| **Tilsamans** | **kr.** | **18.500.000** |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at skrivað verður undir partalagssáttmála millum Tórshavnar kommunu, Sp/f TG Verk og Sp/f MAP ark. og at játtað samlaða kostnaðin á 18,5 mio.kr. íroknað mvg at útbyggja høllina í skúlanum á Argjahamri, og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur nú fingið gjørt sáttmálarnar klárar, ið liggja til grund fyri partalagnum í sambandi við bygginging av ítróttahøll í Skúlanum á Argjahamri.
Sí hjáløgd skjøl t.e. partalagssáttmáli við tilhoyrandi skjølum, umframt ráðgevarasáttmáli við Sp/f MAP ark. og arbeiðstakarasáttmáli við Sp/f TG-Verk. Eisini sæst mynd av nýggjari leið til arbeiðsvegin, ið er broytt í mun til viðgerðina seinast.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimilað at skrivað verður undir partalagssáttmála millum Tórshavnar kommunu, Sp/f TG-Verk og Sp/f MAP ark, umframt ráðgevarasáttmála við Sp/f MAP ark. og arbeiðstakarasáttmála við Sp/f TG-Verk

**Fíggjarnevndin 25. februar 2016:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar. Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin ella skal fíggjast av honum.

Nú verkætlanin, "Høllin á Argjahamri" L57025 skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt hall á kr. 881.000.

Stýrisbólkurin fyri Útbygging av Høllini á Argjahamri hevur eftirmett verkætlanina. Mett verður, at prosjektering og byggiarbeiði sum heild er væl útint, og tekur høllin seg sera væl út. Mett verður somuleiðis, at partalagið gekk sum heild væl ímillum byggiharra, arbeiðstakara og ráðgeva; men at ov lítið av peningi varð sett av ókendum kostnaði til hesari

verkætlan frá byrjan, og tískil fór kostnaðurin nakað útyvir játtanina. Tíðarætlanin helt als ikki, og ymsar avbjóðingar vóru við at gera so stórt arbeiði, samstundis sum virksemi í bygninginum skuldi halda fram.

Samanumtikið verður mett, at verkætlanin er væleydnað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjórin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at loka verkætlan L57025 og at hallið verður fíggjað av konto 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttan til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 172/18 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 4/18 | 18/00057-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 28.02.2018 | 78/18 | 18/00057-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 62/18 | 18/00057-2 |
| 4 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 37/18 | 18/00057-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 155/18 | 18/00057-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 186/18 | 18/00057-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 173/18 | 18/00057-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 145/18 | 18/00057-2 |
| 9 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 172/18 | 18/00057-2 |

**Upprunin til málið:**
Sí niðanfyri

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Víst verður eisini til mál 14/01009 í sambandi við, at fimleikarhøllin er bygd út til nýggja ítróttarhøll á Argjahamri, og at tað í hesum sambandi varð tikin avgerð um at byggja frítíðarskúlan út, tí sum bygningspartar eru teir sambygdir. Talan er um 130 m2 stóran rábygning, ið er gørdur og innilokaður, men uttan vindeygu og hurðar.

Umsitingin hevur biðið MAP arbeiða víðari við hesari verkætlan við at prosjektera, søkja um byggiloyvi og gera eina samlaða kostnaðarmeting at byggja frítíðarskúlan lidnan. Her er í høvuðsheitum talan um timbur-, gólv-, stál-, el-, hvs-, ventilatións- og málaraarbeiði, vindeygu og hurðar, snyrilsstáltrappu til høllina, íroknað ráðgevarakostna, prosjektumsiting og trygging. Sí annars skitsutekning av innrætting.

Umsitingin ætlar at bjóða arbeiðið út í undirhondsboð til høvuðsarbeiðstakararnar Sp/f TG-Verk og Sp/f 10.dec. 2013. TG-Verk kennir til verandi høll á Argjahamri. Sp/f 10.dec. 2013 hevur arbeiðsroyndir við loftshæddini á Hoyvíkshøllini, sum er eitt líknandi arbeiði sum útbyggingin av frítíðarskúlanum.

Á íløguætlanini fyri 2018 eru settar kr. 1,8 mió av til endamálið á kontu 3175 barnaansing.

**Lógir, ásetingar o.a.**
ABF 06, ABR89

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/01009

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at bjóða bygginigna av frítíðarskúlan á Argjahamri út eftir omanfyristandandi leisti og at geva umsitingini heimild at samráðast um sáttmála at leggja fyri nevnd til endaliga støðutakan.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til ráðgevaraavtalu við MAP Arkitektar áljóðandi kr. 285.000, ið fevnir m.a. um myndugleikaprosjekt, útbjóðingartilfar og skipan av útboði, høvuðsprojekt, byggileiðslu, fakeftirlit og garantisýn.

Tíðarætlan fyri samlaðu verkætlanina er, at myndugleikaprosjekt skal vera sent kommununi 1. mars 2018, byggiloyvi fáast til vega og útboð til arbeiðstakarar í apríl. Ætlandi verður arbeiðstøkusáttmáli latin mentamálanevndini í mai, so at byggingin kann byrja í juni. Byggingin skal vera liðug um ársskiftið.

Biðið verður harumframt um at flyta kr. 1.800.000 av íløgukarminum 3175 Barnaansing L00001 til nýggja løgukontu Útbygging Frítíðarskúlanum á Argjahamri.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at góðkenna ráðgevarasáttmálan og at játta kr. 1.800.000 á løgukarmi

**Mentamálanevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Byggiarbeiðið er boðið út í undirhondsboð til arbeiðstakararnar Sp/f BP Bygging og Sp/f TG-Verk. Innkomnu tilboðini eru soljóðandi:

BP Bygging: kr. 2.969.600,00 u/mvg.

TG-Verk: kr. 2.830.660,00 u/mvg.

Høvuðsráðgevin og umsitingin hava verið í samráðing við lægsta tilboðsgevan TG-Verk, til tess at eftirkanna tilboðið og at finna møguligar tillagingar, ið kunnu hava við sær lægri kostnað. Eftir hesar sparingar er tilboðið hjá TG-Verk kr. 2.408.822,00 u/mvg. Avleiðing av hesum er m.a., at trappurúmið/-uppgongdin til høllina ikki verður gjørd.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera Frítíðarskúlan á Argjaharmri lidnan, tvs. tilboðskostnaðurin (hvú), ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging og mvg íroknað, og er samlaði kostnaðurin kr. 3.147.695,00.

Sum kunnugt er játtanin kr. 1,8 mió á kontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri. Tað resta sostatt kr. 1,35 mió í. Kostnaðarmetingin, sum íløgujáttanin byggir á, er upprunaliga frá várinum 2017, men ásannast má, at henda hevur ikki verið nóg neyv.

Aðrar íløgujáttanir eru ikki á grein 3 í fíggjarætlanini.

Mett verður, at til ber at flyta kr. 300.000 av rakstrarkontu 3317 Ungdómshús á Argjum, ið er minninýtsla frá 2017, og kr. 200.000 av rakstrarkontu 3142 Frítíðarskúlan á Argjahamri, ið somuleiðis stavar frá minninýtslu í 2017, til verkætlanina. Játtanartørvur er tá kr. 850.000, ið mett verður ikki ber til at fáa til vega á grein 3.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa til vega kr. 850.000 aftrat til verkætlanina til tess at kunna taka av tilboðnum og gera arbeiðstøkusáttmála.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Víst verður til fíggjartørvin omanfyri, har kr. 850.000 vanta í til tess at kunna gera arbeiðstøkusáttmála við lægsta tilboðsgevan. Umframt nevndu fígging verður mett, at til ber at játta kr. 676.000 av kontu 3214 Broytingar og minni umvælingar, og kr. 172.000 av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum.

Viðmerkjast skal, at játtanin til kontu 3214 er ætlað til at gera realskúlan kláran til dagstovn, men onnur játtan verður ætlandi fingin til vega sum íløgu í eykajáttan (sí mál 18/01522). Viðvíkandi kontu 3216, sum er játtan til frítíðartilboðið til 3. flokk, so verður mett, at skerda játtanin onga ávirkan fær á virksemið.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og leiðarin í barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera arbeiðstøkusáttmála vil TG-Verk fyri tilboðsupphæddina kr. 2.408.822 u/mvg og játta kr. 3.147.695 til samlaða byggi- og projektkostnaðin av løgukontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri.

Harumframt verður mælt til at flyta kr. 200.000 av kontu 3142 Frítíðarskúlin á Argjahamri, kr. 676.000 av kontu 3214 Broytingar og minni umvælingar, kr. 172.000 av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum, og kr. 300.000 av kontu 3317 Ungdómshús á Argjum til løgukontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Heðin Mortensen, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið i býráðið at viðgera sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 173/18 Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - plásstørvur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 42/18 | 18/00482-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 157/18 | 18/00482-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 02.07.2018 | 236/18 | 18/00482-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 04.07.2018 | 216/18 | 18/00482-1 |
| 5 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 173/18 | 18/00482-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | | | 18/00482-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í Frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini ganga børn úr 1. og 2. flokki úr Sankta Frans skúla. Harumframt hevur Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini eisini frítíðartilboð til 3. flokk úr sama skúla.

Talan er sostatt um seks skúlaflokkar íalt, tvs. í mesta lagi 144 børn. Skúlaárið 2017/2018 eru 93 børn úr 1. og 2. flokki tilmeldað og 40 børn úr 3. flokki, tað er 133 børn.

Sum nú er, halda 93 børn frá 1. og 2. flokki í Sankta Frans skúla til í hølinum í Badmintonhøllini, meðan høli verður leigað í B36-húsinum til 3. flokk.

Hølini í Badmintonhøllini vórðu sett í stand í 2017 til eina normering á 70 børn treytað av, at ventilatión varð løgd inn. Tað er ikki gjørt enn. Avleiðingar av, at 93 børn eru inni í hølum, ið ikki eru hóskandi til 70 børn, er m.a., at tað er plásstrot í klædnarúminum hjá børnunum. Tískil eru børn noydd at deilast um klædnarúm.

Frítíðarskúlin er harumframt noyddur til at skipa virksemið soleiðis, at tað altíð er ein flokkur úti av húsinum hvønn dag. Vanliga verður svomið fýra dagar um vikuna, ið er eykaútreiðsla fyri stovnin, harumframt eru útferðir o.a. Tey koma tá ikki aftur á stovnin fyrr enn kl. 16, tá meira rúmsátt er.

Fyri at skapa pláss fyri børnunum í frítíðarskúlanum, hevur frítíðarskúlin eisini sjálva Badmintonhøllina hvønn dag frá kl. 12 til 16, tá badmintonfelagið kemur at venja.

Á úti økinum framman fyri Badmintonhøllina er fyribils merkt upp við betong kubbum, sum vísa hvar spæliøkið er á parkeringsplássinum. Aftanfyri Badmintonhøllina hevur frítíðarskúlin sett smáttur upp.

40 børn úr 3. flokki halda til í høli í B36 húsinum. Hølini liggja tætt við Badmintonhøllina og tó eitt sindur burturfrá. Gott samstarv er við B36 um hølini og tey viðurskifti, sum fylgja við. Hølini eru tó ov lítil til 40 børn. Hølið hevur eisini verið rakt av lekum, sum nú verða umvældir.

Áður hava verið tankar um at byggja Badmintonhøllina út bæði til ítróttaendamál og frítíðarskúla. Skal frítíðarskúlin har rúma øllum seks flokkunum, skulu hølisumstøðurnar tvífaldast úr verandi 70 plássum til 144.

Er loysnin at tryggja, at pláss er fyri fýra flokkum í Badmintonhøllini – t.d. 1.-2. flokk ella 2.-3. flokk, og at loysnin fyri hinar báðar flokkarnar verður aðrastaðni, so er tørvurin at økja verandi 70 pláss til 96.

Hølisloysn til hinar báðar flokkarnar kundi verið í ítróttabygningum í Gundadalsøkinum ella aðrastaðni.

Mett verður neyðugt at seta fyrireikandi arbeiðið í gongd at meta um, hvørt tað er møguligt, eisini við atliti at nýggju bygningskunngerðini, at byggja verandi frítíðarskúla út til annaðhvørt 96 børn ella til 144 børn, harundir kostnað. At byggja heilt nýggjan stovn er annar møguleiki.

Felags fyri hetta er tó, at tað tekur langa tíð.

Skjótari alternativ til útbygging er at fáa til vega modulir sum tey hjá Spíranum, ið kundu verið staðsett á parkeringsplássinum, ella at leiga høli í Gundadalsøkinum ella aðrastaðni.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til í fyrsta umfari at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Frítíðarskúlin í Badmintonhøllin hevur plásstrot og fær ikki hýst øllum 133 børnunum, ið eru tilmeldað frítíðarskúlan hetta skúlaárið. Um 3. flokkur ikki fær tilboð eftir summarfrítíðina 2018 í Badmintonhøllini er barnatalið 90 til hølir, ið ikki eru góðkend til 70 børn. Allir møguleikar eru royndir og troyttir í mun til skipa virksemi á fleiri matriklum runt um Badmintonhøllina í Gundadali.

Avbjóðingin við at leiga á fleiri matriklum er, at tað ikki er normering til at vera á fleiri matriklum, tí tað krevur fleiri starvsfólk til at manna tilboðið. Tískil er tað ein avbjóðing at vera nóg nógv tilstaðar umframt, at tað er trupult at fáa faklærd fólk í starv í frítíðarskúlum. Trupult er tá at tryggja, at tilboðið livir upp til ásettu námsætlanina og virðisgrundarlagið annars í Tórshavnar kommunu.

Umstøðurnar hjá børnunum eru heldur ikki í lagi. Eitt nú hava tey ikki hvør sína garderobu til skiftiklæði v.m. Haraftrat eru vesi-viðurskiftini hjá børnum og starvsfólkum heldur ikki nøktandi. Ventilatiónsskipan er heldur ikki í lagi og ætlast ikki gjørd hvørki í ár ella næsta ár vegna vantandi fígging hjá Húsaumsitingini.

Plásstrotið í Badmintonhøllini má tí loysast við at útvega stovninum fleiri høli skjótast gjørligt. Hetta kundi verið gjørt við at sett upp fyribilshøli á útiøkinum frammanfyri núverandi hølum. Ein slík loysn má fyrireikast og kostnaðarmetast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla til, at umsitingin fær heimild at fyrireika og kostnaðarmeta ætlan um at útvega fyribilshøli til Frítíðarskúlan í Badmintonhøllini at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Eftir summarfrítíðina eru 90 børn innskrivaði í Frítíðarskúlan í Badmintonhøllini. 3. flokkur fær tilboð í Margarinfabrikkini eftir summarfrítíðina.

Hølini í Badmintonhøllini eru einans góðkend til at húsa 50 børnum. Tískil eru átøk neyðug at gera beinanvegin.

Mentamálanevndin hevur heimilað umsitingini at fyrireika og kostnaðarmeta ætlan um at útvega fyribilshøli, men vísir tað seg, at Verkætlanardeildin ikki kann gera

fyrireikingararbeiðið, ið skal til fyri at seta barakkir á parkeringsøkið við Badmintonhøllini, uttan eina ítøkiliga játtan. Kostnaðurin er áleið kr. 300.000 fyri fyrireikingararbeiðið og 2 barakkir kosta áleið kr. 2. mill.

Fyri at frítíðarskúlin kann góðkennast til 70 børn má ventilatión setast í. Húsaumsitingin hevur ikki førleikar til at gera hesa meting, men má HVS ráðgeving meta um arbeiðið og koma við kostnaðarmeting. Henda ráðgeving kostar sbrt. Húsumsitingini áleið kr. 30-40.000.

Nú summarfrítíðin nærkast og ongin haldbar loysn er funnin má frítíðarskúlin leiga onnur høli, sum fyrr er víst á ikki er haldbart. Hølið í HB húsinum kann leigast fyribils fyri kr. 8-10.000 umframt reingerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 300.000 til fyrireikingararbeiði umframt kr. 2 mill. til 2 barakkir.

Eisini verður mælt til at játta kr. 30-40.000 til, at ein ráðgevi kann meta um arbeiði og koma við kostnaðarmeting til at leggja ventilatión í frítíðarskúlan.

Harumframt verður mælt til at játta húsaleigu fyri at leiga høli í HB húsinium kr. 8-10.000 umframt reingerðing til ventilatiónsarbeiðið er liðugt og barakkirnar kunnu takast í brúk.

**Mentamálanevndin 02. juli 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um ventilatiónskipan og játta kr. 40.000 av kontu 3215 barnaansing aðrar útreiðslur til ráðgeving í sambandi við ventilatiónskipan.

**Fíggjarnevndin 04. juli 2018:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Tikið av skrá.

# 174/18 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |
| 36 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 44/17 | 14/03408-18 |
| 37 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 71/17 | 14/03408-18 |
| 38 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 120/17 | 14/03408-18 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.04.2017 | 89/17 | 14/03408-18 |
| 40 Fíggjarnevndin | 26.04.2017 | 103/17 | 14/03408-18 |
| 41 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 158/18 | 14/03408-18 |
| 42 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 140/18 | 14/03408-18 |
| 43 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 115/18 | 14/03408-18 |
| 44 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 190/18 | 14/03408-18 |
| 45 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 232/18 | 14/03408-18 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 205/18 | 14/03408-18 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 47 Mentamálanevndin | 02.07.2018 | 238/18 | 14/03408-18 |
| 48 Fíggjarnevndin | 04.07.2018 | 217/18 | 14/03408-18 |
| 49 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 174/18 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

Matr.nr. 1099 14.660 m²
Matr.nr. 1100 15.280 m²

Matr.nr. 1102c 5.879 m²

Tilsamans 35.819 m²

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**

Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

| | |
|---|---|
| P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum | - 287.151.814 kr. |
| P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum<br>(eisini nevnt: Samtakið í Havn) | - 298.955.524 kr. |
| P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum | - 267.809.320 kr. |

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við, at byggiverkætlanin verður skipað í partalagssamstarvi millum Tórshavnar kommunu, Samtakið Eind Í/F og Samtakið Articon – Búsetur Í/F, skal sbrt. partalagsskipanini skipast ein stýrisbólkur við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og bæði samtøkini.

Bygginevndin, sum hevur virkað higartil, gongur tí út, men mælt verður til, at býráðið velur umboð í stýrisbólkin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja umboð í stýrisbólkin í partalagnum.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vóru Gunnvør Balle, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Partalagsavtala varð undirskrivað 17. november 2016. Síðani hava partarnir arbeitt við at gjøgnumganga og menna verkætlanina sbrt. ætlanini í partalagsavtaluni, herundir at fáa sent myndugleikaprojekt til góðkenning hjá byggivaldinum. Hetta var gjørt fyrst í apríl og er endaligt svar væntandi um stutta tíð.

Eisini er arbeitt við at fáa ásett endaliga byggikostnaðin. Í tilgongdini eru fleiri tilagingar gjørdar við atliti til at náa ein nøktandi targetkostna samsvarandi upprunaligu ætlanini, sí hjálagt skjal. Eisini sæst at, í tilgongdini eru nakrar postitiónir, sum av misgáum ikki vóru við í upprunaliga útboðstilfarinum/nøgdarlistunum, og sum nú eru roknaðar við.

Targetprísurin er nú ásettur til kr. 247.000.000 við avhending í einum byggistigi 1. apríl 2020, tó so, at møguliga vilja partar av verkætlanini kunna verða liðug áðrenn, men er ov tíðiliga at áseta tað enn. Arbeiðið kann byrja at kalla beinanvegin. Verandi arbeiðstøka við planering er um at vera liðug.

Nú er klárt at taka støðu til um farast skal víðari í partalagsfasu 2 og gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála.

Kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m. umframt mvg) er nú kr. 383.073.750.

Higartil eru játtaðar kr. 101.752.000 til verkætlanina, harav kr. 42.075.000 er standa í løgukarmi 4176 Nýbygging skúlar fyri fíggjarárið 2017, og aðrar kr. 37.809.000 standa sum minninýtsla fyri 2016 og tí skulu framflytast í sambandi við ársroknskapin hjá kommununi.

Írestandi fíggjartørvur avrundað er sostatt kr. 281.323.000, ið skulu játtast yvir fíggjarárini 2018, 2019 og 2020. Mett verður, at fíggjartørvurin fyri inniverandi ár er kr. 61.015.000, tvs., at í inniverandi fíggjarárið er kr. 18.869.000 sett ov nógv av, og kann løgukarmurin tí lækkast fyri inniverandi fíggjarár.

Samlaði fíggjartørvurin fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður sambært hesum tí kr. 300.192.000. býtt soleiðis samsvarandi væntaðum útreiðslutørvi fyri hesi ár: í 2018 kr. 110.175.000, í 2019 kr. 127.383.000, og í 2020 kr. 62.634.000.

Hjáløgd málinum er:
a) frágreiðing um fyriliggjandi forprojekt til góðkenningar
b) uppskot til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Samtakið Articon-Búsetur Í/F
c) kostnaðaryvirlit

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðkenna hjálagda forprojekt og høvuðsarbeiðstøkusáttmála og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina, har samlaði kostnaðarkarmurin fyri byggingina er kr. 383.073.750.

Til tess mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at játta fyri fíggjarárið 2017 kr. 23.206.000 á løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar út á løgukontu L41012 Skúlin á Fløtum, og flyta minninýtslu á somu løgukontu fyri fíggjarárið 2016 kr. 37.809.000, og at írestandi upphæddin kr. 300.192.000 fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður játtað samsvarandi býtinum omanfyri, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevdini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti**:
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2018 eru játtaðar 100 mio.kr til verkætlanina. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á á leið 91 mio. kr til arbeiðstakarar og ráðgevar. Hartil koma ymiskar útreiðslur hjá byggiharranum. Samstundis er við 1 viðgerð samtykt í býráðnum framflytning av minnunýtsluni í 2017 á 6.541 tkr. (sí mál 18/01521 – Framflytingar fyri árið 2017). Mett verður hóskandi at hava eitt ávíst fíggjarligt rásarúm fyri um verkætlanin kemur at vinna inn á settu tíðarætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 92 mio. kr. av løgukarminum 4176 á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt**.**

**Ískoyti**:
Fíggjarnevndin biður um, at fáa málið á skrá til kunningar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Víst verður til skjal nr. 14/03408-83.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjórin, deildarleiðari á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við arbeiðstakara og ráðgeva um dagføring av partalagsavtaluni at leggja fyri aftur í nevndunum til góðkenningar. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur havt samráðingar við partarnar í partalagssamstarvinum t.e. Í/F Articon-Búsetur og Í/F Eind og er komin til eina semju. Sí hjálagt ískoyti til partalagsavtaluna (dagfest 17. November 2016) og ískoyti til arbeiðstakarasáttmálan (dagfestur 10. Mai 2017).

Ískoytini innibera at TK hækkar upphæddina til ókendu puljuna við 5 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til at lækka targetkostnaðin frá 248 mio.kr. til 247 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til tilkeyp í sambandi við eina betri takloysn, soleiðis at endamálið við at gera takið atkomiligt og brúkiligt kann vera rokkið.

Hesar broytingarnar innibera, at kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m., umframt kommunalt MVG) fer úr 383.073.750 til kr. 390.511.250. Væntandi hava hesar broytingar ikki samanlagt fíggjarligar avleiðingar í 2018 og helst heldur ikki í 2019 og eisini tengt at, hvussu umfatandi brúkið av tí ókenda verður framyvir. Í sambandi við viðgerðina av fíggjaræltanini í heyst verður nærri nágreina um periodisering av játtanini til verkætlanina í 2019 og 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin fyri verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við ískoytinum til partalagsavtaluna fyri Skúlan á Fløtum og at hækka samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina til kr. 390.511.250. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. juli 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 04. juli 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt.

# 175/18 Arbeiðsbólkur at endurskoða reglurnar um samsýning av kommunustýrislimum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 200/18 | 18/01897-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 162/18 | 18/01897-1 |
| 3 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 175/18 | 18/01897-1 |

**Upprunin til málið:**
Til tess at lýsa, um samsýningarnar til kommunustýrislimir eru á einum hóskandi støði í mun til arbeiðsøki og ábyrgd, mælir borgarstjórin til at seta arbeiðsbólk at endurskoða samsýningarnar og arbeiðsumstøðurnar annars hjá kommunustýrislimum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við, at alsamt fleiri uppgávur eru lagdar føroysku kommununum at umsita, er arbeiðsøkið hjá kommunum víðkað og sostatt eisini arbeiðsuppgávurnar og ábyrgdin, ið eru álagdar limunum í føroysku kommunustýrunum.

Kommunustýrislimir verða samsýntir sambært kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini. Kunngerðin hevur heimild í § 9 í kommunustýrislógini, løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Síðani kommunustýrislógin kom í gildi 1. Januar 2001 er kunngerðin um samsýningar broytt nakrar ferðir, seinast 9. september 2014.

Síðani tá er eitt nú eldraøkið lagt til kommunurnar at umsita, og borgarstjórin metir, at tað hevði verið hóskandi at endurskoða reglurnar, ið kommunustýrislimir verða løntir eftir.

Tá ið reglurnar um samsýning av landsstýris- og tingfólkum hava verið endurskoðaðar, hevur ein óheft nevnd gjørt hesa endurskoðan og tilmælið hesum viðvíkjandi til Løgtingið.

Á sama hátt – og soleiðis, at kommunustýrislimir ikki sjálvir skulu gera tilmæli um, hvussu limir í kommunustýrunum skulu samsýnast – verður mælt til at seta eina óhefta nevnd við serkønum innan lønar- og kommunustýrisviðurskifti at endurskoða reglurnar um samsýning av kommunustýrislimum og gera tilmælið til fíggjarnevndina um, hvørjar broytingar, nevndin heldur, eiga at verða gjørdar í hesum reglum.

Nevndin skal í arbeiði sínum m.a. taka støði í tí veruleika, at kommunurnar umsita fleiri málsøki í dag, enn tær gjørdu áður, og at arbeiðsbyrðan og ábyrgdin hjá kommunustýrislimum er økt.

Mælt verður til, at nevndin skal viðgera spurningin um, hvørt:

- verandi upphæddir í kunngerðini um samsýning av kommunustýrislimum eiga at verða reguleraðar í mun til ábyrgd og tign hjá kommunustýrislimum.
- tað er rætt at rinda eftirløn av samsýningini til kommunustýrislimir.
- borgarstjórarnir skulu samsýnast og hava eftirløn samsvarandi landsstýrisfólkum/løgmanni

- aðrar tillagingar av reglunum og arbeiðsumstøðunum hjá kommunustýrislimunum eiga at verða gjørdar.

Tað er ikki býráðið sjálvt, ið hevur heimild at broyta reglurnar um samsýning av kommunustýrislimum. Fíggjarmálaráðið hevur ábyrgdina av hesum reglum, og arbeiðið hjá óheftu nevndini skal tí vera grundarlag undir einari møguligari áheitan á Fíggjarmálaráðið um at endurskoða kunngerðina um samsýning av kommunustýrislimum.

Í tann mun, nevndin kemur við tilmælum um at broyta kunngerðina um samsýningar til kommunustýrislimir, og Fíggjarmálaráðið tekur undir við einari áheitan frá Tórshavnar kommunu um at gera uppskotnu broytingarnar, verður mælt til, at broytingarnar fáa virknað frá komandi býráðsvalskeiði.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.
Kunngerð nr. 93 frá 9. Septemver 2014 um samsýningar o.a. sambært kommunustýrislógin
Kommunustýrisskipanin fyri Tórshavnar kommunu

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | 300.000 kr. | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir til at seta eina óhefta nevnd við serkønum innan lønar- og kommunustýrisviðurskifti at endurskoða reglurnar um samsýning av kommunustýrislimum, og hvørt tað er hóskiligt at gera aðrar tillagingar av arbeiðsumstøðunum hjá

kommunustýrislimum og at játta kr. 300.000 av konto 20910 sum eykajáttan til arbeiðið hjá nevndini.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 300.000 til arbeiðið hjá nevndini sum eykajáttan og beina málið í býráðið, har tað krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juli 2018 | Blað nr.: 682 |
| | Formansins merki: |

# 176/18 Gera ymisk átøk undir Kongavarða, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.04.2018 | 21/18 | 18/01334-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 114/18 | 18/01334-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 91/18 | 18/01334-2 |
| 4 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 176/18 | 18/01334-2 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við søluna av grundøkjum undir Kongavarða, er partur av sølupeninginum oyramerktur til at gera ymiskar manglar og ábøtur í økinum. Áheitan er komin frá eigarafelagnum undir Kongavarða, um ymisk ítøkilig átøk.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Átøk ið ynski er um at fáa gjørd eru: Asfaltering og at fáa gongu- og súkklubreyt gjørda frá innkoyringini til býlingin og inn. Eisini skulu gerast 36 parkeringspláss inni frá vegnum. Spælipláss, sum eigarafelagið skal standa fyri at gera, skal gerast eystanfyri íbúðarblokkarnar, alt sambært uppskot 18/01334-1.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

Kommunan hevur selt part, uml. 5500 m$^2$, av matr. nr. 255 a fyri 3 mill. Ætlanin er at brúka hesa upphædd til omanfyri nevndu átøk. Peningurin er tøkur á kt. 6175

Raðfesting er gjørd fyri tøka peningin, ið er kr. 3.000.000,-.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | nei | nei | nei | Nei |
| Umhvørvisavleiðingar | nei | nei | nei | nei |
| Sosialar avleiðingar | | | ja | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | ja | nei | nei | nei |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at peningurin verður brúktur av kt. 6175 at gera asfaltarbeiðið liðugt, at gera 36 P-básar og veita stuðul til at gera spælipláss eystan fyri verandi íbúðarblokkar.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 177/18 Umsókn um at broyta byggisamtyktina í sambandi við matr. nr. 1292f og 1292a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 38/18 | 18/00747-3 |
| 2 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 65/18 | 18/00747-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 144/18 | 18/00747-3 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 160/18 | 18/00747-3 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.07.2018 | 156/18 | 18/00747-3 |
| 6 Mentamálanevndin | 02.07.2018 | 243/18 | 18/00747-3 |
| 7 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 177/18 | 18/00747-3 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um at byggja hotell á matr. nr. 1292f og 1292a, við Oknarvegin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við ætlanir um at byggja hotell við Oknarvegin skal marknaumskipan fara fram millum matr. nr. 1292f, Tórshavn og matr. nr. 1292a, Tórshavn, sambært skjal nr. *18/00747-4 – Marknaumskipan.*

Matr. nr. 1292f og 1292a, Tórshavn liggja í øki A1 og C3 í 3. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Fyri at marknaðarumskipa matriklarnar og fyri at loyvi skal kunna verða at byggja hotell í økinum, má alt økið broytast til C3 øki.

Býarskipanardeildin metir, at hetta hóskar seg væl, av tí tað verður ein natúrlig leinging av tí C3 økinum, sum longu er. Hettar hevur eisini við sær eina meira natúrliga avmarking av A1 økinum, ið liggur eystanfyri økið, sum ætlanir eru at byggja hotell á.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru millum annað:

1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

Ásetingar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru millum annað:

1. *Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.*

Umframt at økið, eftir broyting, liggur C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, liggur økið eisini í serstøku byggisamtykt nr. 3, B1 og eru ásetingar har millum annað:

> *Eindirnar B1, B2 og B3 kunnu bert verða nýttar til handilsbúðir, skrivstovur, fyrisiting, heilsubótarhøli, byggingar til mentanar-endamál (bókasavn, kykmyndahøll o.a.) og tílíkt.*

Sostatt er eitt hotell ikki í stríð við ásetingarnar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ella ásetingarnar fyri B1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 3.

**Skjøl**
18/00747-2 – *Ávegis myndugleikauppskot_smallsize*
18/00747-4 – *Marknaumskipan*
18/00747-5 – *Hotel Oknarvegur – fyri broyting*
18/00747-5 – *HotelOknarvegur – eftir broyting*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at góðkenna uppskotið um at broyta almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu sambært kortskjølunum og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**:
Í sambandi við almennu hoyringina av broytingini í byggisamtyktini hevur Tórshavnar kommuna fingið eitt mótmæli. Mótmælarin mótmælir ætlanini at broyta A1-øki til C3-øki og orsøkin er:

1. *"Partur av bóndahúsinum á eystara Húsagarði (ofta nevnd Mexico) eru millum tey elstu húsini í Havn. Guðrun Rubeksen, sum var bóndadóttur á Húsagarði, hevur sagt mær, at tann lægra lonin er bygd í 1670-árunum. Seinri er bygt upp í húsini... Eftir mínum tykki eru húsini friðingarverd.*
   *Húsagarður var í fleiri hundrað ár á Húsabrúgv, men í 1939 vórðu bóndahúsini tikin niður og flutt niðan í Gundadal, sum lá til Húsagarð. Orsøkin var hon, at tað var ikki hildið at vera hóskiligt, at ein bóndagarður við fjósi og køsti lá miðskeiðis í Havnini. Nýtt fjós varð bygt í Gundadali. Og hetta fjósið var millum fyrstu nútímans fjósini í Føroyum. "*

2. *"Nú er næstan eingir grønir blettir eftir í sjálvari Havnini. Tí eigur hesin bletturin at fáa frið. Tað er higartil eydnast at varðveita ein grønan geira frá gomlu ognini hjá Torvald Poulsen niðan til Húsgarard. Talan er um eina heild, sum hevur eitt estetiskt viðrið, og sum eigur at liggja sum ein grønur geiri fram við R.C. Effersøesgøtu. "*

Ad. 1 – Bóndahúsini á Húsagarði eru ikki á listanum hjá Tjóðsavninum yvir friðaðir bygningar og er ikki fevnt av løgtingslógini nr. 11 um friðan av fornminnum og bygningum. Í Tórshavnar býaratlasi, sum er ein skráseting av varðveitingarvirðum í Tórshavn, sum býráðið lat gera í 2007, eru bóndahúsini ei heldur skrásett sum varðveitingarverd.

Tó hevur umsitingin samskift við savnsarkitektin á Tjóðsavninum, har ynski varð lagt fram at fáa skrásett bygningin, at møguliga fáa fatur á tilfarinum ella at fáa flutt húsini. Umsitingin fer ikki inn yvir hetta, men vísir á, at Tjóðsavnið kann í samráð við eigaran av bóndahúsinum gera avtalu um skráseting, tilfar og at fáa húsini flutt.

Ad. 2 – Matr. Nr. 1292a og 1292f liggja frammanundan í C3 og A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er øki ætlað bygging. Sostatt ávirkar hendan broytingin í almennu byggisamtykini fyri Tórshavnar kommunu ikki tær ætlanir, ið eru fyri grøn øki í býnum.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at halda fast við broytingini, sum samtykt á býráðsfundi 22. mars 2018 og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykt at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, taka undir við tilmælinum, men mæla til at senda málið til Fornminnismyndugleikarnar.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Marin Katrinu Frýdal um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í tekstinum omanfyri stendur "*Í Tórshavnar býaratlasi, sum er ein skráseting av varðveitingarvirðum í Tórshavn, sum býráðið lat gera í 2007, eru bóndahúsini ei heldur skrásett sum varðveitingarverd."* Hetta er ikki rætt, tí húsini eru í Tórshavnar býaratlasi skrásett varðveitingarverd í stigi 4-6, sum er miðal høgt varðveitingarvirði.

Virkandi býararkitekturin hevur samskift við savnsarkitektin á Tjóðsavninum, sí notat frá telefonsamrøðuni *Notat_Tjóðsavnið*, journal nr. 18/00747-13.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina. Eisini verður mælt til at øll onnur viðurskifti verða tikin upp seinni, tá Tjóðsavnið hevur gjørt sínar viðmerkingar og skrásetingar og at beina málið í mentamálanevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juli 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 02. juli 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Samtykt við átta atkvøðum fyri, ongari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen

# 178/18 Matr. nr. 135gx, Hoyvík. Umsókn um loyvi til víðarisølu av grundstykkið við ástandandi bygningi í gerð.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 04.07.2018 | 219/18 | 18/02404-2 |
| 2 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 178/18 | 18/02404-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá advokati vegna keypara dagfest 20.06.2018.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Talan er um vinnugrundstykkið Kirkjustræti 2. Vídd 2.350m2, við ástandandi bygningi í gerð sum er til víddar tvær hæddir á uml. 600m2, ella í alt uml. 1.200m2.

Søkt verður um loyvi til víðarisølu av matr.nr. 135gx, Hoyvík.

Advokaturin greiðir frá, at eitt smápartafelag hevur ætlanir um at keypa matr.nr. 135gx, Hoyvík frá Sp/F 135gx, Hoyvík.

Æltanin er at gera bygningin lidnan skjótast tilber, og at leiga hann út til skrivstovu og heilsurøktar endamál.

Á ognini er tinglýstur servituttur sum ásetur, at ognin ikki kann seljast fyrr enn bygningur er liðugtbygdur á grundstykkið. Advokaturin vísir á at bygningur er bygdur á stykkið, sum er innilokaður.

Sambært grein 10 í tinglýstum skeytið, framgongur sum tinglýstur servituttur við átalurætti til Tórshavnar kommunu, at grundstykkið matr.nr. 135gx, Hoyvík kann ikki seljast víðari fyrrenn bygningur er liðugtbygdur á grundstykkið, og at kommunan kann krevja sær ognarrættin til grundstykkið, móti at keypspeningurin verður afturgoldin uttan rentur. Fellur grundstykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrja bygging, kann hann fáa skjalprógvaðar útreiðslur endurgoldnar uttan rentur í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama grundstykki til góðar.

Upprunaliga seldi kommunan grundstykkið í 2007, og er víðarisøluskeyti frá hr. til sp/f tinglýst í 2017.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini.** Sí málslýsing.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Talan er um frávik í mun til skeytisáseting/servitutti.

**Umhvørvisárin**. Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Sí j. Nr.**

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli**: Vísandi til, at innilokaður bygningur er bygdur á ognina, mæla kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni til at loyva og taka víðarisøluna til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin 04. juli 2018:** Samtykt at víkja frá ásetingini í grein 10 í skeytinum og góðkenna viðarisølu av ognini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Samtykt við sjey atkvøðum fyri, ongari ímóti og seks blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**FUNDURIN LOKIN KL. 19:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |